Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Nr. 62/2019

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a

Fyrispurningur um prísin á útróðrarfiski, settur landstýrismanninum í fiskivinnumálum Jacobi Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakað fyri at betra um góðskuna á útróðrarfiski, soleiðis at útróðrarbátar fáa besta prísin?

Viðmerkingar:

Fyri at hava bestu góðsku á fiskatilfeingi okkara, sum kemur til lands, er hagreiðing avgerandi. Her verður hugsað um alla handfaring av fiskinum frá tí, at hann verður fiskaður, til hann er í sølubúðunum.

Útróðrarfiskur skuldi verið sera góð vøra og eigur at kunna seljast fyri besta prís. Hetta er bara ikki altíð støðan í dag. Fleiri orsakir kunnu vera til tess.

Ein orsøk kann vera, at smáu lastirnar, sum verða vigaðar inn, verða samlaðar saman frá fleiri útróðrarbátum og skildar í somu kassar, áðrenn selt verður. Tí fáa allir hesir bátar sama prís. Er onkur av hesum bátum, sum hevur vánaligan fisk ella illa hagreiddan fisk, fáa allir hinir sama minni góða prís á marknaðinum. Møguliga kundi betri skiljing bøtt um hetta.

Ein onnur orsøk kann liggja í hagreiðingini frá tí, at fiskurin verður drigin upp úr sjónum. Um fiskurin beinanvegin verður blóðgaður og lagdur í ísvatn, og beinanvegin verður kruvdur, tá hann kemur uppá land, vildi hetta óiva bøtt um góðskuna og givið betri prís.

Tí seti eg landsstýrismanninum omanfyrinevnda fyrispurning.

Á Løgtingi, 5. mars 2020

Jóhannis Joensen